

*– Tað er fleiri sjómenn sum duga væl at mála, sigur Jaspur Kruse úr Kunoy. Her sýnir hann fram ein málning av línubátinum Bragd úr Klaksvík, har hann sjálvur er fastur egnari*




*Jaspur Kruse hevur málað síðani hann var barn. Henda verður kortini neyvan við á framsýningini til Sjómannadagin um vikuskiftið, tí sum hann sigur: – Seglini eru heldur stív. Eg má fáa meiri lív í tey!*

# Sjómenn duga annað enn at rætta tong

**Sjómenn og egnarar eru egnaðir til annað enn bert at arbeiða umborð. Fleiri teirra duga eisini væl at mála, og nú verður eisini ein serstøk framsýning við verkum eftir hesum monnum. – Hetta fer vónandi at eggja teimum og øðrum við at taka penslarnar í hond, sigur Jaspur Kruse, sum sjálvur er egnari hjá einum línubáti í Klaksvík.**

SJÓMANNADAGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kunoy:** Fríggjadagin kl. 14 letur upp ein heldur sjáldsom og óvanlig framsýning á Stongunum í Klaksvík.

Tað er nevniliga ikki á hvørjum degi at almenningurin hevur atgongd til ein egningarskúr – og serliga ikki, tá hesin er umskapaður til ein listaskála.

Í samband við Sjómannadagin hava menn fyrireikað eina framsýning av listarverkum, sum sjómenn og egnarar hava latið úr hondum.

Júst hvussu mong listarverkini verða er ikki greitt enn. Men lítil ivi er kortini um, at tey vera væl omanfyri 30, tá til stykkis kemur.

–Nógvir av málningunum verða av skipum, bátum og øðrum, sum hava beinleiðis við sjólívið at gera. Men talan verður kortini eisini um myndir av landsløgum og slíkum, sigur ein av stigtakarunum, Jaspur Kruse úr Kunoy.

Sjálvur fer hann at hava fleiri málningar við á framsýningini, m.a. av bátinum hann egnir hjá og tí skipinum, hann í síni tíð átti, saman við einum øðrum manni.

Umframt Jaspur verða fimm aðrir mans við. Felags fyri teir allar er, at teir hava havt við sjóvinnu at gera so ella so, – og sjálvandi at teimum hevur dámað væl at mála.

Framsýningin í egningarskúrunum á Stongunum er opin alt vikuskiftið.

### Í røttum umhvørvi

Jaspur, sum herfyri fór um tey seksti, byrjaði at mála longu sum smádrongur. Hann er ættaður av Eiði, men hevur búð í Klaksvík og nú í Kunoy, og var lítið meiri enn 11 ára gamal, tá hann fyrstu ferð byrjaði at mála.

Síðani tá er tað vorðið til fleiri málningar í ymiskum støddum. Men spennandi avbjóðingina og framsýningina, sum nú stendur fyri framman, hevur hann ikki roynt áður. Og neyvan nakar av hinum listarfólkunum heldur.

Hugskotið um eina framsýning við sjómonnum í einum egningarskúri í fiskivinnuhøvuðsstaði okkara spratt eisini úr einum práti millum tveir mans við áhuga fyri útróðri í einum egningarskúri á Stongunum.

> ” *Hugskotið um eina framsýning við sjómonnum í einum egningarskúri í fiskivinnuhøvuðsstaði okkara spratt burtur úr einum práti millum tveir mans við áhuga fyri útróðri í einum egningarskúri á Stongunum í Klaksvík*

– Formaðurin í okkara egningarskúri – Alexandur Joensen – og eg komu ein dag í prát um komandi sjómannadagin. Út frá hesum práti spratt so hugskotið um eina listaframsýning við sjómonnum.

– Við hesi framsýningini ynskja vit at geva okkara íkast til umfatandi skránna í samband við dagin, sigur Jaspur Kruse.

Sjálvur fer hann at hava nakrar myndir við, m.a. av línubátinum Bragd, sum hann egnir hjá, og av Turid, sum hann sjálvur átti í síni tíð saman við Hans Paula Purkhús.

– Jú, hetta verður ein fjølbroytt framsýning, lovar hann.

### Sjómanstak

Jaspur hevur havt mong ár bæði á sjógvi og á landi. Og hann kennir tí væl til støðuna hjá sjómonnum.

– Tað verður ofta tosað um tað, at tær bestu løturnar hjá einum sjómanni eru tær, sum hann hevur fyri seg sjálvan umborð á skipi.

– Hesar løturnar kunnu nýtast til ymiskt. Men tað er als ikki óvanligt at síggja menn sita fyri sjálvar og tekna, greiðir Jaspur frá. – Sjómenn duga annað enn at rætta tong og taka sjómanstak!

Hann bæði var og er tí av teirri sannføring, at tað eru fleiri sjómenn sum duga at mála meiri enn bert til húsbrúks. Og tí verður nú skipað fyri hesi – helst fyrstu – framsýningini av slíkum slagi.

Hon letur upp fríggjadagin kl. 14 og er opin til út á sunnudagin.

### Víðakendur

Jaspur ynskti at fáa fatur á so nógvum monnum sum tilbar. Hann ringdi til fleiri teirra, sum høvdu verið sjómenn ella egnarar og spurdi, um áhuga teirra at vera við í framsýningini. Teir játtaðu beinanvegin!

– Tá eg spurdi teir, so var einki við at teir søgdu „ja, kanska“ ella okkurt tílíkt. Nei, eg merkti á teimum, at teir vóru sera fegnir fyri henda møguleikan.

– Nógvir teirra hava málað í nógv ár, men hava aldrin luttikið á framsýningum áður. Tað tyktist sum teir vóru fegnir um, at nú kundu onnur fólk síggja tað, sum teir høvdu málað, greiðir Jaspur frá.

Vónin hjá Jaspuri og hinum er, at aðrir sjómenn fara at gera vart við seg, soleiðis at teir kunnu hava eina enn størri og fjølbroyttari framsýning komandi ár.

Teir eru vitandi um ein eldri mann úr Skúgvi – Hanus Skálagarð – sum hevði sítt serøki í at mála skip. Hann var upprunaliga sjómaður, men er í dag eitt kent listarnavn í USA.

Um nakar av sjómonnunum og egnarunum í Klaksvík koma so langt, tað vil tíðin bert vísa!

### Eitt arbeiðspláss

Eitt er tað geniala hugskotið at geva sjómonnunum henda møguleikan at sýna verk síni fram. Annað er so sjálvt staðið, har framsýningin verður.

Ætlanin er nevniliga at hava framsýningina í trimum av egningarskúrunum norðarlaga á Stengarbrúnni.

Í hesum døgum er lítið lív í egningini, tí menn bíða eftir at fiskiárið skal byrja. Vanligt hevur tí verið at skúrarnir verða málaðir og hampaðir hesa tíðina.

Tað eru teir eisini gjørdir í ár, og tí eru umstøðurnar tær bestu og tær røttu til eina slíka listaframsýning, tá latið verður upp fríggjadagin.

Í hesum sambandi fáa fólk somuleiðis møguleika at síggja, hvussu ein slíkur egningarskúrur sær út. Her verða tí eisini stampar, agnskerimaskinur og slíkt at síggja, umframt tey mongu listarverkini.

Alt í alt er lagt upp til eina spennandi framsýning við sjómonnum, um sjólívið og fyri øll tey, sum hava áhuga í málningalist.

## FAKTA

**SEKS SJÓMENN SÝNA FRAM**

Á framsýningini í teimum trimum egningarskúrunum á Stongunum verða seks mans við. Óhugsandi er ikki at enn fleiri verða við.

Teir seks sum við vissu verða við eru hesir:

- Adolf Johannesen úr Hósvík
- Sigmund Andreassen úr Vági
- Tórur Andreasen sum er búsitandi í Danmark
- Livar Nysted úr Hvannasundi
- Sørin Petersen úr Klaksvík (deyður)
- Jaspur Kruse úr Kunoy